# Roysningur *Odobenus rosmarus*

Aaveq | Rostungur | Hvalross | Morša | Hvalros | Atlantic walrus



Forvitnir roysningar © Robert Stewart

Roysningur er størstur av kópasløgunum í Arktis, har brimilin er tvær ferðir so tungur sum opnan. Teir liva allastaðni í Arktis, og teir eru kendir fyri yvirskeggið og tær longu høggtenninar. Roysningar eru sosial djór og liva tætt saman í bólkum uppi á landi ella á ísi – og ferðast somuleiðis eisini í bólkum á sjónum.

**Longd á vaksnum** 3 metrar
**Vekt á vaksnum** 1,500 kg
**Hámarksaldur** 40 ár
**Tað etur** einamest skeljadjór, onnur botndjór, við hvørt kópur ella fuglur
**Bólkastødd** í túsundatali

**Ránsdjór** hvítabjørn, bóghvítuhvalur
**IUCN-støða** nærum hótt (2023)
**Ovurnøgd í Norðuratlantshavinum** 30,000
**Veitt í** 53 roysningur/ár
miðaltal fyr 2019-2023

**Hóttanir:**

Ljóðórógv | Veðurlagsbroytingar | Dálking | Veiða

FOLD

# Roysningur *Odobenus rosmarus*

Aaveq | Rostungur | Hvalross | Morša | Hvalros | Atlantic walrus

Roysningur er víðagitin vegna høggtenninar, sum kunnu blíva heilt upp móti 1 m til longdar og viga uml. 5 kg. Tenninar hjá brimlinum eru vanliga nakað størri og verða nýttar í bardøgum; brimilin við teimum størstu tonnunum er vanliga tann ráðandi. Høggtenninar kunnu eisini nýtast at klintra upp á land úr sjónum við ella gera andingarop í ísin. Nakrir stórir brimlar hava ravlittar blettir á høggtonnunum frá spikinum av kópum, sum teir hava etið. Høggtenn hava nógv virði fyri fólk, ið gera myndaskurð og prýðislutir burtur úr teimum.



Ein roysningur á ísinum
© Christian Lydersen /
Norwegian Polar Institute



Roysningur nýtir síni snoddhárat finna føð
© Kit Kovacs & Christian Lydersen /
Norwegian Polar Institute

Kosturin hjá einum roysningi er í høvuðsheitum skeljadjór, sum teir finna við at brúka viðkvomu snoddhárini á ella í havbotninum. Tá ið granskarar kannaðu magainnihaldið hjá roysningi, funnu teir bert kjøtið frá skeljadjórunum, ikki skeljarnar. Hetta tí roysningur sýgur innan úr skeljadjórunum og letur skeljarnar liggja eftir á havbotninum. Teir kunnu eta í túsundatali av skeljadjórum í eini slíkari máltíð. Súgvikraftin hjá einum roysningi er umleið 4 ferðir so sterk sum í einum miðalstórum dustsúgvara.

**Gransking:** Roysningur hevur vanliga ein kanelbrúnan lit, men viðhvørt síggja teir út til at hava ein ljósareyðan lit. Hvussu ber tað til?